

SALT fer at arbeiða fyri og leggja karmar til; hann er bangin fyri, at hetta fer at niðurlaga føroyskt mentanarvirksemi við at taka burtur av mentanarjáttanini hjá Landstýrinum. Helmsdal óttast stórliga fyri, at *"Saltsiloin [...] fer at tyngja føroyskt mentanarlív, so at ein stórur partur av løgtingsins játtan til føroyska mentan fer at verða nýttur til at upphita og viðlíkahalda eitt stórt, flott og tómt hylki í [S]uðuroy"*. Bæði mentamálaráðharrin og nýsetti fíggjarmálaráðharrin hava annars alment lovað, at eingin peningur av mentanarjáttanini verður brúktur til SALT-verkætlanina.

Viðvíkjandi tí tóma hylkinum í Suðuroy, kunnu undirritaðu einans viðganga, at vit vita ikki um nakra meira framsókna ætlan fyri at menna og framføra føroyska mentan og list fyri heiminum enn SALT.

Tað er tó ein rímiligur spurningur at seta, hví ein framtíðar mentanarkatedralur í Suðuroy skal fáa - ikki bert árligan stuðul úr Landskassanum – men eisini eina dópsgávu frá øllum føroyingum upp á 20 mió. kr.?

SALT skal verða eitt hús fyri allar Føroyar og allan heimin. Tí eru samanberingarnar, ið bæði Djurholm og Helmsdal gera við onnur mentanarhús í landinum, sjálsagt burturvið.

Voltaire ávaraði ímóti at gera tað besta til fíggindan hjá tí góða; Landsstýrið hevur ikki ráð at fíggja hvørjum einasta kaffihúsi og listaskála í Føroyum, men hetta merkir ikki, at ávís mentanarhús ikki kunnu fáa ein part av fíggjarlógini. Løgtingslimurin fyri Fólkaflokkin og rektarin í Hoydølum kunnu væl ikki veruliga meina, at um landskassin ikki kann rinda til alla mentan í Føroyum, so skal hann ikki rinda til nakra mentan yvirhøvur? Hevði hetta ikki merkt, at heldur ikki tann leingi saknaði Tjóðleikpallurin kann fáa kundi fingið almennan stuðul?

Undirritaðu hava samkenslu við teimum sjónleikarum og sjónleikaáhugaðu, ið kenna seg lopin um – ótrúliga arbeiðið, ið føroyskir sjónleikarar hava sýnt millum ár og dag, eigur at verða teimum lønt aftur við einum glæsiligum tjóðarleikpalli. Men minnist til orðini hjá Voltaire – vit mugu ansa okkum fyri ikki at seta tvær góðar sakir sum SALT og Tjóðleikpallin upp sum fíggindar; lat okkum heldur síggja SALT framt í verki sum eitt tekin uppá eitt skifti í føroyskum mentanarpolitikki. SALT má gerast einans byrjanin uppá hetta skiftið.

Bjarni Djurholm dregur eisini Kirkjubømúrin fram, sum um kjakið ikki er gruggað nóg mikið við óviðkomandi tosi: *"Tá vit ikki í ártíggju hava klárað Tjóðleikpallin og Kirkjubømúrin betur enn higartil, so er hugsandi, at hvaðna verri kann tað tað [sic] gerast við Saltsiloini á Tvøroyri. Livst so spyrst."* Tað er sjálvandi rætt, at tann, ið einki ger, ger heldur einki galið; men tað er keðiligt at síggja ein garvaðan politikara fyri ein 'framburðssinnaðan' flokk sum Fólkaflokkin at hava ein so ódjarvan hugburð um avbjóðingar sum hesa.

Sjálvandi vilja allir føroyingar, at 'Múrurin' skal varðveitast, tí hann er okkara størsta og týdningarmesta fornminni; men hetta kjakið hevur nú koyrt í áratíggju, um ikki øldir, og enn er ongin endalig loysn funnin, hóast tørvurin enn er tann sami. Hetta er eitt sera trupult mál. Við SALT er øðrvísi – ein loysn fyriliggur.

At brúka varðveitingina av einum søguligum húsi í Kirkjubø ímóti varðveitingini av einum søguligum húsi á Drelnesi er sera vánaligt! Serliga, tí Bjarni Djurholm hevur, sum ein av longst sitandi løgtingslimum, havt nógv ár at finna eina haldbara loysn viðvíkjandi Kirkjubømúrinum. (Hóast undirritaðu harðliga mótmæla brúk av almennum pengum til bygging av eini nýggjari kirkju á Argjum – tí vit halda fast um, at Landsstýrið skal ikki gera mun millum átrúnaðir við at fremja og gjalda fyri virkseminum hjá bert einum teirra – so halda vit orsøk verða fyri at stuðla eini alment fíggjaðari umvæling av katólsku kirkuni í Kirkjubø. Hetta, ikki einans, so føroyingar varðveita ein søguligan dýrgrip, men eisini tí tað er ørt at byggja enn eina kirkju í Tórshavnar kommunu, ið frammanundan er á tremur við alskyns trúarhúsum!)

SALT er eitt frálíkt høvi hjá øllum føroyingum at varðveita ein týdningarmiklan bygning og hjá føroyskari mentan og list at røkka nýggjum hæddum. Ætlanin er greið; floksformenn hava játtað pening, eins og Tvøroyrar kommuna hevur; og víst er á óteljandi møguleikar, ið hesin depilin einaferð í nærmastu framtíð kann brúkast til.

Um man hyggur at, hvussu Saltsilan skal rekast, so er lætt at síggja, at mentanarhúsið fer bæði at virka í nærumhvørvinum, tjóðarliga og altjóða. Hetta virksemið fær sjálvsagt jaligar avleiðingar fyri ferðavinnuna í Føroyum sum heild.

Suðuroyggin kennist fyri nógvar føroyingar sum eitt fjart og ókent stað. SALT skal verða fyri allar føroyingar, og um vit øll vilja kennast við hana, kann Saltsilan á Drelnesi við tíðini verða við til at skapa meiri ferðslu og samstarv og harvið knýta tættari bond millum allar føroyingar.

Undirritaðu vóna, at SALT verður móttikið av øllum við sama jaliga anda, sum blásti lív í verkætlanina frá byrjanini. Fólk mugu ikki lata seg ávirka av misvísandi og óærligum tosi um Tjóðleikpallin, Kirkjubømúrin og ymisk mentanarhús í landinum, ið ikki fáa almennan stuðul. Slíkt er bíligt uttanumtos hjá fólkum, ið einans nevna Atlantis og Mentanarhúsið í Fuglafirði fyri at mótarbeiða eini verkætlan í Suðuroy, ið als ikki stendur í andsøgn við nakað mentanarvirksemi norðanfjørðs. Hetta kemur frá politikarum, ið ikki áður hava víst mentanardeplum ans, og bert vilja flyta fokus frá SALT við eittans endamáli fyri eyga – at SALT gerst til onkis.

Um hesum landi skal verða lív lagað, so mugu allir føroyingar gera sær greitt, at vit eru øll í sama báti – Føroyar má síggjast sum *eitt* land, so togtoganin millum miðstað og útjaðara steðgar – vit føroyingar mugu líta á hvør annan og koma hvørjum øðrum við. Okkara mentan er tað, ið bindur okkum saman sum fólk, og listin kann verða tað, ið vit fylkjast um sum tjóð. Hon kann verða okkara andlit út í heim, og tað fyrsta vit bjóða fremmandum vælkomnum við.